

*Runavíkar kommuna hevur seinastu árini verið í støðugum vøkstri og menning. Kommunan hevur uml. 3.700 íbúgvar og 140 ársverk, og er í einari positivari menning innan økir, sum mentan, vinnulív, tænastu, undirvísing og íbúgvaraviðurskifti.*

# Fíggjarleiðari
## Runavíkar kommuna

Starvið er tvíbýtt soleiðis at fíggjarleiðarin hevur yvirordnaðu ábyrgdina fyri kommunalu fíggjarstýringini, og er eisini starvsfólkaleiðari. Arbeiðsuppgávurnar, sum viðkomandi kemur at røkja, eru í høvuðsheitum hesar:

### Høvuðsuppgávur:

Fíggjarleiðsla:

- Leiða fíggjardeildina (Roknskap, búskap, frágreiðingar v.m.)
- Koma við ársfrágreiðing av fíggjarligu gongdini í mun til fíggjarætlan og politiskt settir málsetningar. Frágreiðing í mun til fíggjarætlan skal gerast hvønn mánað.
- Gjaldførisstýring, lønsemismetingar og íløgumetingar.
- Skipa fyri at støðugt optimalisera fíggjarumsiting og veitaraavtalur.
- Kunnað býráðið um týðandi broytingar í inniverandi fíggjarári í mun til ætlaðar útreiðslur og inntøkur.
- Tryggja góðan stuðul til fíggjarstýringina á undirdeildum og um neyðugt skipa fyri upplæring.

Starvsfólkaleiðsla:

- Saman við øðrum leiðarum at tryggja trivnað hjá starvsfólki.
- Saman við starvsfólkunum leggja ætlanir fyri menning hjá starvsfólkunum, fyri soleiðis at styrkja kommunala førleikan.
- Leggja frítíðarætlanir soleiðis, at hetta darvar dagliga kommunala virkseminum minst møguligt.
- Taka avgerðir í starvsfólkamálum, innanfyri teir karmar ið eru ásettir av Býráðnum bæði fíggjarliga og starvsfólkaliga.

### Ynskiligir førleikar:

- Leiðsluførleikar og góð samstarvsevnir.
- Royndir frá samráðingum og ger av avtalum.
- Royndir innan roknskap og fíggjarstýring.
- Royndir frá verkætlanum og verkætlanarroknskapum.
- Hollan teldutøkniskan førleika.
- Hægri viðkomandi útbúgving.

### Persónligir eginleikar:

Sum persónur vænta vit, at tú ert neyvur, ágrýtin og miðvísur, tær dámar væl stórar avbjóðingar og tú hevur lætt við at samstarva. Harafturat vænta vit, at tú er fleksibul og kanst arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, tá tað krevst. Tú trívist við at arbeiða ímóti freistum og hevur evnir til at hava ein jaligan hugburð bæði innanhýsis og uttanhýsis.

Løn og setanartreytir annars verða sambært avtalu arbeiðsgevara.

**Nær og hvar:** Umsóknir verða at senda skjótast gjørligt og í seinasta lagi mánadagin 10. apríl 2006 til: Runavíkar kommunu, Heiðavegur 26, 600 Saltangará, tlf. 417000. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Rodmundur Nielsen, Borgarstjóra. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**Heimarøktin**
*Suðuroy*

## Heimarøktin í Suðuroy søkir eftir
# feriuavloysarum

**Sjúkrarøktarfrøðingum**
**Heilsurøktarum**
**Heilsuhjálparum/Heimahjálparum**

Søkt verður eftir summarferiuavloysarum at arbeiða í skiftandi vaktum í Heimarøktini í tíðarskeiðnum 1. juni til 31. august 2006.

Vit sóknast eftir heilsustarvsfólki sum hava royndir innan heimarøkt, evni at arbeiða sjálvstøðugt, duga at samskifta og hava góð samstarvsevni, eru før/ur fyri at arbeiða undir skiftandi umstøðum.

Ynskiligt er at umsøkjarar siga frá hvar ynskt verður at arbeiða.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Um tú ynskir at vita meir um størvini ert tú vælkomin at ringja til økisskrivstovuna, tlf. 373907.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Heimarøktin øki 5**
att: Jeanna í Lágabø, økisleiðari
900 Vágur

**Umsóknarfreist:** 24. apríl 2006.

# Tekniskur leiðari til Vestmanna Kommunu

Í sambandi við at Tekniski leiðarin hjá okkum tekur við nýggjum avbjóðingum, verður starvið hervið lýst leyst at søkja.

Tekniski leiðarin hevur dagligu leiðsluna av Teknisku deild hjá kommununi um hendi.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. hesar**

- at hava dagligu umsitingina av øllum tekniskum útbúnaði hjá kommununi.
- málsviðgerð og ráðlegging.
- tilrættalegging og stýring av kommunalum uppgávum – eisini peningaliga.
- at standa fyri útbjóðingum og gera tilmæli til avvarðandi nevndir í bygdarráðnum.
- bygdar- og byggiætlanararbeiði.
- projektering og eftirlitsarbeiði.
- at standa fyri og menna skrásetingararbeiðið av tekniskum leiðingum.

**Vit vænta, at tú**

- er byggifrøðingur, verkfrøðingur, arkitektur ella hevur aðra viðkomandi útbúgving.
- hevur leiðsluroyndir, torir at taka skjótar avgerðir og standa við ábyrgd.
- dugir væl at samskifta við onnur og hevur góðan skriviførleika.
- ert røkin og dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt.
- hevur góðan telduførleika og dugir at brúka m.a. skrivi- og tekniforrit.

**Vit bjóða tær**

- góða løn til rætta førleikan.
- møguleika fyri skeiðum sum varða av arbeiðsøkinum.
- eitt sera fjølbroytt og spennandi starv við góðum møguleikum at menna seg persónliga.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og hevur tilvísing til Teknisku nevnd og borgarstjóran.
Lønar- og setnaðarviðurskifti eru við avvarðandi yrkisfelag ella eftir nærri avtalu.

Er hetta nakað fyri teg? Send okkum eina umsókn til:

**Vestmanna Kommuna**
**Bakkavegur 16**
**FO-350 Vestmanna**
Umsóknir skulu merkjast **"Tekniskur leiðari"**

Umsóknin má verða okkum í hendi í seinasta lagi 28. apríl. 2006. Miða verður eftir at seta starvið frá 1. juni 2006 ella eftir avtalu.

Hevur tú fleiri spurningar? Ring á tlf. 47 01 15 og fá meira at vita um starvið.

*Vestmanna Kommuna skilar sær rætt til frítt at velja ímillum umsøkjararnar ella ongan at velja.*

*Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.*

**Vestmanna Kommuna**
www.vestmanna.fo